


*Uttan at taka nakað frá hinum framúr góðu tónleikarunum á gospelkonsertini á Vágsbøi sunnukvøldið, so kann ikki sigast annað enn, at tónleikurin frá Torkil og hansara fólki skaraði framúr.*

# Stórt punktum fyri festivalinum

**Gospelkonsertin á Summarfestivalinum varð hildin uttandura, hóast veðurgudarnir høvdu skift sinnalag. Tað var nakað av sirmi, men tað helt tó ikki fólki aftur. Vælílatin við regnskjólum lótu tey seg undirhalda í góðar tveir tímar**

SUMMAR FESTIVALUR 04
*Solby A. Eliasen,*
*solby@sosialurin.fo*
*Myndir: Álvur Haraldsen*



*Marita/Maria á norskum og føroyskum var helst ein tann mest serliga løtan á konsertini*

**Klaksvík:** Gospelkonsertin byrjaði nakað seinni enn ætlað, men tað bilti tó ikki, hóast nakað váttligt var í veðrinum. Harvið fingu fyrireikararnir roynt festivaløkið í ivasamum veðri eisini, tí um hetta verður eitt afturvendandi tiltak, so kann neyvan roknast við, at veðrið verður so gott hvørjaferð.

Góð nøvn vóru á skránni hetta kvøldið, og fólk gleddu seg at hoyra gospeltónarnar.

Sigrid Rasmussen var fyrst á pallin. Við sínari flottu rødd hugtók hon allar áhoyrararnar, men av tí at tað einans vóru hon og Gunnar Guttesen á klaveri á pallinum, so tyktiskt tað sum, at hon til tíðir hevði hug at hvørva á tí stóra pallinum. Hetta komst kanska eisini av, at hon var fyrst, og løgini vóru mest sum øll á tí meiri stillu síðuni.

Ikki so løgið, at allir einstaklingarnir dagin fyri, stóðu á lítla pallinum við Sparikassan. Har rukku tey nógv betur út til áhoyrararnar enn Sigrid gjørdi sunnukvøldið. Men tað kann hennara framførsla sum so ikki lastast fyri, tí hennara lutur lá ikki eftir.

## Fagervik og Kim

Tá Sigrid var liðug við sína framførslu, kom Hans Inge Fagervik á pallin. Hóast her aftur var talan um einstakling, so megnaði hann væl at røkka út til áhoyrararnar. Hann hevði eisini nakrar tónleikarar afturat sær, sum munaðu nógv.

Beinanvegin tá Hans Inge Fagervik byrjaði at tosa, fekk ein ta fatanina, at her var talan um ein sera sympatiskan persón. Røddin hjá honum er kraftig, og hann rakk út um allan býin.

Hæddarpunktið á hansara framførslu var tó, tá hann byrjaði at syngja vakra lagið Marita. Ella Maria, sum vit betur kenna hann á føroyskum. Og mitt í sanginum kom so Kim Hansen á pallin, og skiftust teir um at syngja hvør sítt ørindi á ávíkavist norskum og føroyskum. Hetta dámdi áhoyrarunum sera væl.



*Sigrid Rasmussen og Gunnar Guttesen byrjaðu gospelkonsertina á Summarfestivalinum 2004*

## Torkil skaraði framúr

Victor Carlsen var frásøgumaður á konsertini, og hann mátti tosa eina góða løtu, áðrenn næsta orkestrið var klárt. Torkil Mørkøre og hansara fólk, sum var tað manssterkasta orkestrið á pallinum hetta kvøldið, tóku nakað av tíð, áðrenn teir vóru klárir. Men tá tað so var klárt, fingu áhoyrararnir tónar at hoyra, sum fanga eitt hvørt oyra.

Tónleikurin var melodiøsur og vælframførdur. Eisini bæði sást og hoyrdist tað væl á áhoyrarunum, at her var veruliga talan um lívliga framførslu og gospeltónleik, tá hann er best.

Serliga seinasta lagið Sælur er hann, ið fátækur er, fór uttan iva inn undir húðina á teimum flestu. Tónarnir fyltu alt økið væl og virðiliga og rættuligt lív kom í fólk. Ilt er at seta orð á, júst hvat tað var, sum gjørdi, at hetta orkestrið fangaði so væl, men á ein ella annan hátt megnaðu teir tað eina tonn betur enn hini. Spennandi er at vita, um Torkil og co. fara at koma út við einari fløgu skjótt.

## Gamal kenningur

Seinasti tónleikari á pallin var Kjell Samuelson. Hann hevur verið í Føroyum fleiri ferðir áður, og hann sang nakrar av sínum slagarum. Hann spældi somuleiðis nøkur nýggj løg, sum eru á hansara seinastu fløgu. Og hóast fólk høvdu staðið í regni í góðar tveir tímar, so var lagið avbera gott, og teimum dámdi væl konsertina. Kjell Samuelson endaði sína framførslu og harvið konsertina við vakra lagnum If tomorrow never comes.

Síðani bóru fólk, sm skuldu úr býnum skjótt at. Dúgvan sigldi beint eftir konsertina. Hon mátti sigla tveir túrar fyri at kunna flyta øll tey vitjandi av aftur Klaksvík.

Gospelkonsertin var tað veruliga punktumið fyri Summarfestivalinum 2004, og eisini tann konsertin eydnaðist framúr væl. Men spurningurin er tó, um ikki hon kundi samantvinnast við ta stóru konsertina, sum var dagin fyri. Tað hildu nøkur fyri, sum stóðu millum áhoyrararnar hetta sunnukvøldið.

Beint eftir konsertina varð farið í holt við at rudda av aftur. Tí mánamorgunin skuldi verða koyrandi aftur eftir Biskopstøgøtu, so tað mundi líða nakað út á náttina, áðrenn fyriskiparar og hjálparfólk sluppu heim.



*Kjell Samuelson, sum hevur verið nógv í Føroyum, sang nógvar kendar sangir, og tað dámdi áhoyrarafjøldini*



# Kári p aftur á pall

**Hanus G. Johansen, Kári p og Martin Joensen eru millum nøvnini, sum verða at hoyra á Platform fríggjakvøldið. Talan er um eina stuðulskonsert til frama fyri eini uttanlandsferð hjá føroyskum børnum við krabbameini**

STUÐULSKONSERT
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*




*Fríggjakvøldið verður stuðulskonsert á Platform til frama fyri uttanlandsferð hjá føroyskum børnum við krabbameini*

Klokkan 21 fríggjakvøldið skipar Platform fyri eini áhugaverdari stuðulskonsert til frama fyri føroyskum børnum við krabbameini. Talan er um eina rættiliga spennandi og fjølbroytta skrá.

Tónleikararnar, ið hava játtað at spæla á tiltakinum eru: Sámal og Ronnie, Hanus G. Johansen, Kári p, Finnur og Ronnie (Páll Finnur Páll), Terji Rasmussen, Martin Joensen og Deja Vu.

Mest forkunnuga navnið er uttan iva Kári p, sum lítið og einki hevur verið at hoyrt til seinastu árini. Fløgurnar hjá Kára, Vælferðarvísur og Hinumegin Ringvegin, eru fyri langari tíð síðan blivin fólkaogn, og tí verður spennandi at hoyra, hvat trubadururin hevur at bjóða upp á fríggjakvøldið.

Allir tónleikarar spæla ókeypis, og somuleiðis eru lýsingar, plakatir o.a. latið ókeypis.

## Danmarkarferð

Atgongumerkini til stuðulskonsertina kosta 100 kr., og allur peningurin fer óskerdur til eina Danmarkarferð hjá føroyskum børnum við krabbameini. Talan er um eitt familjuvikuskifti á Sankt Helene Centret í Tisvildeleje í september mánað, har føroysk børn við krabbameini saman við foreldrum og systkjum fáa møguleikan at hitta danskar familjur, ið eru í somu støðu.

Endamálið við ferðini er at geva børnunum eina góða uppliving og foreldrunum møguleika at koma í samband við onnur foreldur, sum eru í somu støðu. Danmarkarferðin er eisini ein góður møguleiki hjá børnunum at fáa eina fatan av, at ein Danmarkarferð kann snúgva seg um annað enn sjúkrahúsvitjanir og krabbamein.

# Bárður skavar pening saman

**Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum, Bárður Nielsen, hevur lagt uppskot um eykajáttan til bæði Musikkskúlan og Brimil**

EYKAJÁTTAN
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

Vantandi játtan til Brimil og Musikkskúlan hava staðið ovast á breddanum í fjølmiðlunum í summar, og landsstýrið ger nú eina roynd at skava pening saman. Fríggjadagin legði landsstýrismaðurin í fíggjarmálum, Bárður Nielsen, uppskot um eykajáttan fyri løgtingið.

Stendur tað til landsstýrið verður játtanin til Musikkskúlan hækkað við 450.000 krónum, og hesin peningur skal fáast til veða við at lækka játtanina til Frítíðarundirvísing við 200.000 krónum og økið Ítróttaranlegg við 250.000 krónum.

Bárður Nielsen ynskir eisini at hækka netto játtanina til Vaktar- og Bjargingartænastuna, ið hevur Brimil um hendið, við 1. mió. krónum. Hesin peningur skal fáast við at lækka játtanina til Fiskivinnumenning við einari mió. krónum.

# Ongin skúlagongd á ALV



*Skúlagongdin á ALV-skúlanum við Áir er útsett í 14 dagar*

**Næstformaðurin í ALV-stýrinum, Bartal Kass, sigur, at næmingarnar á ALV-skúlanum fara ikki undir skúlagongdina við Áir áðrenn 30. august. Næstformaðurin vil ikki greiða nærri frá, hví skúlagongdin hjá næmingunum á ALV-skúlanum er útsett 14 dagar**

ÚTSETT SKÚLAGONGD
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

Skúlagongdin hjá næmingunum á ALV-skúlanunum við Áir skuldi av røttum byrjað mánadagin, men so varð ikki.

Seinastu mánaðirnar hevur rættiligt rok stungið seg upp um skúlastjóraviðurskiftini á ALV-skúlanum, og sum skilst er orrustan millum frákoyrda skúlastjóran, Øssur av Steinum, og ALV-stýrið høvuðsorsøkin til, at skúlaárið 2004/05 við Áir ikki fór av bakkastokki mánadagin.

Næstformaðurin í ALV-stýrinum, Bartal Kass, sigur, at stýrið hevur gjørt av at útseta skúlaársbyrjanina til 30. august. Spurdur, hvør orsøkin er til, at næmingarnar á ALV ikki fóru undir skúlagongdina mánadagin, svarar næstformaðurin, at tað hevur hann onga viðmerking til.

Spurdur, um tað er orrustan millum Øssur av Steinum og ALV-stýrið, ið er høvuðsorsøkin, svarar Bartal Kass enn einaferð, at tað hevur hann onga viðmerking til.

Sosialurin royndi bæði mánadagin og týsdagin at fáa fatur á formanninum í ALV-stýrinum, Doris Hansen, men tað eydnaðist okkum ikki.

SKEIÐSTOVAN KVASIR FARODANE

**Telduskeið til nýbyrjaran**

Skeiðini, ið hava verið sera væl umtókt og nógv vitjað, eru aftur á skránni eftir summarfrítíðina.

**Lær at nýta teldu**
3 x kl. 09:00-12:00: 20/08 + 27/08 + 03/09

**Lær myndaviðgerð - digitalfoto og skanning**
3 x kl. 09:00-12:00: 30/08 + 06/09 + 13/09

**Lær at nýta bókhald**
3 x kl. 09:00-12:00: 01/09 + 08/09 + 15/09

**Lær at nýta internet**
3 x kl. 13:30-16:30: 08/09 + 15/09 + 22/09

**Lær at nýta rokniark**
3 x kl. 09:00-12:00: 24/09 + 01/10 + 08/10

Tel 320 204
www.kvasir.fo